# Samanumtøka mál 2022

## IRF setti 5 mál fyri 2022:

## Mál 1

**Detailprojektera og bjóða út verkætlanina í Trøllavík í Suðuroy í 2022 og byrja arbeiðið fyrst í 2023.**
Útbyggingin í Trøllavík gevur betri arbeiðsumstøður, tí verandi støð er gomul og ótíðarhóskandi. Nýggja útbyggingin hevur nútíðarhóskandi høll við pressu og kvørn, soleiðis at avskiping verður gjørd so skynsom sum møguligt og ikki dálkar náttúruna. Eisini verður ein móttøka, har vinna og borgarar kunnu lata burturkast inn. Flestu endurvinningarpláss í Suðuroynni eru smá og megna tí ikki at veita eina nóg góða tænastu til borgaran viðvíkjandi skiljing av burturkasti.

Málið er partur av umhvørvismáli nr. 1: Ábyrgdarfull nýtsla og framleiðsla, ið byggir á heimsmál 12 og umhvørvismáli nr 4: Eitt av Føroya bestu arbeiðsplássum, ið byggir á heimsmál 17.




**Støða**: IRF kom ikki á mál við málinum um Trøllavík í 2023 vegna vantandi fígging. Málið er ikki slept, men sum fíggjarstøðan er beint nú, ber ikki til at seta dagfesting á, nær verkætlanin fer í gongd.

## Mál 2

**Bjóða út bæði byggistigini til verkætlanina í verkstaðnum í Klaksvík í 2022.**
Byggistig 1: Asfaltera uttanumøkið, uppmerkja parkeringsbásar og breiðka verkstaðið niðaneftir, so bilar passa á grøvina. Byggistig 2: Høvuðsumvæla verkstaðið ella byggja nýtt. Umvæling og útbygging av verkstaðnum hevur við sær, at arbeiðsumstøður gerast betri. At alt uttanumøkið verður asfalterað ger eisini, at IRF fyribyrgir dálking av t.d. olju, sum kann seyra niður í undirlagið. Umvælingin tryggjar eisini, at IRF er við í gongdini á el-bilamarknaðinum, tí eitt øki (15 m frá bygninginum) er sett av til møguliga skaddar el-bilar, ið IRF kann fáa inn.

Málið er partur av umhvørvismáli 2: Reint havumhvørvi, ið byggir á heimsmál 6 og 14 og umhvørvismál nr. 4: Eitt av Føroya bestu arbeiðsplássum, ið byggir á heimsmál 17.




**Støða**: 50% avgreitt. IRF hevur bjóðað byggistig 1 út og arbeiðið fór í gongd í mars 2023. Avgjørt var at útseta byggistig 2 fyribils vegna vantandi fígging.

## Mál 3

**Minka um dieselnýtsluna, ið er brúkt til at heinta burturkast frá bingjuplássum og vinnu (bingjubilar) við 3% samanborið við 2021**. Hetta verður m.a. gjørt við at leggja rutur um, soleiðis at bilar altíð koyra stytstu leið.

Málið er partur av umhvørvismáli nr. 3: Grøn og skynsom orkunýtsla, ið byggir á heimsmál 7 og 13.







**Støða**: 100% avgreitt. IRF legði part av rutunum um í 2022 og vísir úrslitið, at dieselnýtslan minkaði 6,2%, hóast 35% fleiri heintingar vórðu gjørdar. Virksemið hjá IRF broytist alla tíðina, og tískil eru javnan tillagingar og betringar, ið kunnu gerast. IRF hevur gjørt av at hava ein arbeiðssetning um áhaldandi at menna ruturnar.

## Mál 4

**Dagføra kunning á heimasíðuna um, hvussu IRF arbeiðir við heimsmálunum, og hvørji átøk eru gjørt í tí sambandi.**
IRF varpar ljós á gongdina í langtíðarmálunum, og tryggjar, at umhvørvis- og menningararbeiðið hjá felagnum ikki steðgar upp. At kunna um síni átøk og mál, kann eisini birta undir at áhugabólkar hjá IRF, t.d. vinnan, fer at seta sær líknandi mál, og soleiðis eru vit øll við til at gera Føroyar grønar.

Málið er partur av umhvørvismáli nr.4: Eitt av Føroya bestu arbeiðsplássum, ið byggir á heimsmál 17.




**Støða**: 100% avgreitt. Heimasíðan er dagførd viðvíkjandi ISO-14001, umhvørvispolitikki og málum.

## Mál 5

**Gera eina starvsfólkahondbók og kunna øll starvsfólk um hana**.

Starvsfólkahondbókin gevur starvsfólkum svar uppá ymiskar spurningar, ið tey sita inni við og er ein háttur at basa ivamálum hjá starvsfólkum. Eisini ger starvsfólkahondbókin, at arbeiðsfólk eru betri før fyri at loysa sína uppgávu hjá IRF.

Málið er partur av umhvørvismáli nr.4: Eitt av Føroya bestu arbeiðsplássum, ið byggir á heimsmál 17.




**Støða**: Er avgreitt. Hendan er gjørd og kann lesast á Intra. Verður javnan dagførd.

Víkarvegur 107 / FO-520 Leirvík / Tel 41 42 43 / irf@irf.fo / www.irf.fo